# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Franskar nýggheitir

**Bæði Peugeot og Citroën boða nú frá, at teir fara at koma á marknaðin við nýggjum Partner og Berlingo seinni í ár. Núverandi Partner og Berlingo eru upprunaliga frá 1996**

Hóast Peugeot Partner og Citroën Berlingo hava verið á marknaðinum í næstan 12 ár, virka teir als ikki ómodernaðir. Men seinni í ár verða teir avloystir av heilt nýggjum modellum.

Nýggju Partner og Berlingo verða eisini gjørdi sum bæði persón- og vørubilar.

Eyðkenni fyri hesar bilar er at teir eru sera rúmligir í mun til støddina og sera væl egnaðir hjá barnafamiljum. Nýggju bilarnir verða nakað størri og rúmligari enn teir núverandi Partner og Berlingo, umframt at innrættingin eisini verður liðiligari. Designið er eisini meira aeorodynamiskt og tíðarhóskandi.

Nýggju Partner og Berlingo koma á marknaðin í summar.

mg



*Peugeot Partner Teepee er ein serútgjørdur Partner við t.d. glastaki og aðrari útgerð*



*Peugeot Partner vørubilur*


*Citroën Berlingo, ið kemur á marknaðin í summar, sum vørubilur og í hesi MPV útgávuni*

# Hummer H3 við last

General Motors hava gjørt íløgur upp á umleið 380 milliónir krónur í enn eina útgávu av Hummer á bilverksmiðjuni í Shreveport í Louisiana. Talan er um Hummer H3T, ið er ein pickup útgáva av Hummer H3, sum kemur á marknaðin eftir summarferiuna 2008.

Bilurin verður gjørdur á somu verksmiðju sum Chevrolet Colorado og GMC Canyon.


*Hummer H3 við last*